# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 27.02.2023 kl. 16.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi
Poul Laust Christiansen (fyri Eir J. Norðberg)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

**1. <u>102-13-2023: Val av Vega- og havnanevnd</u>.**

Gunnhild Mortensen hevur tann 31.01.2023 boðað frá, at hon sigur seg frá sum forkvinnu í Vega- og havnanevndini. Sambært §28, stk. 4 í Kommunustýrislógini, um nevnd skal veljast av nýggjum, so stendur øll tann nevndin fyri vali.

**<u>Avgerð</u>:**

| ***Fastir limir:*** | ***Tiltakslimir:*** |
|---|---|
| 1. Ronni Hammer, einmælt samtykt | 1. Thorstein Thomsen, einmælt samtykt |
| 2. Gunnhild Mortensen, einmælt samtykt | 2. Niels Olaf Eyvindsson, einmælt samtykt |
| 3. Martin í Nesi, einmælt samtykt | 3. Eir J. Norðberg, einmælt samtykt |

**2. <u>102-20-2023: Innkomið tilboð uppá gøtuljós</u>.**

Innkomið tilboð frá Bærendsen Teknik Sp/f uppá 14 stálmeistrar, armatur, betongstabbar v.m. kr. 145.372,00 uttan MVG.

**Tekniska nevnd 22.02.2023:**

Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Bærendsen Teknik Sp/f kr. 145.372,00 uttan MVG.

**Fíggjarnevndin 27.02.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Bærendsen Teknik Sp/f.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt.

**3. <u>102-19-2023: Støðutakan til Suðuroyar Ferðavinnufelag</u>.**

Skriv frá Vágs Kommunu viðvíkjandi Suðuroyar Ferðavinnufelag, ið kommunurnar hava samstarvað um í nøkur ár. Nú onki virksemi er í felagnum longur, hevur Mentamálanevndin hjá Vágs Kommunu viðgjørt Suðuroyar Ferðavinnufelag og er samd um at spyrja hinar limakommunurnar um

at avtaka felagið og at býta peningin millum kommunurnar, ið hava goldið inn.

**Avgerð:**

Samtykt varð við fýra atkvøðum fyri, eftir uppskoti frá Niels Olaf Eyvindsson, at varðveita felagið.

4. **102-94-2022: Uppskot um broyting av byggisamtykt – víðkan av havnalagnum í Nesi.**

Á seinasta bygdarráðsfundi varð samtykt at broyta byggisamtyktina fyri havnalagið í Nesi, so henda samsvarar við verkætlan hjá P/F Bakkafrost um bygging av landstøð.

*Uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri Hvalbiar Kommunu*

Í kap. 2 verða § 5, stk. 1 og 4 orðað soleiðis:

**"§ 5 Umráðispartur D:Havnarøki**

1. Økið verður lagt av til endamál, ið hava við havnarakstur at gera, herundir eisini bátahavnir, skipaferðslu, fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi, bilstøðlar o.t. *Í Nesi er eisini heimilað at byggja landstøð til alivirksemi*. Byggivaldið kann í serstøkum førum loyva, at íbúðir til bústað verða bygdar ella innrættaðar í verandi bygningum, treytað av, at ein ætlan verður gjørd fyri viðkomandi øki.
4. Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 10 m. *Tó kann byggivaldið geva loyvi til, at landstøðir, egningarskúrar o.a., sum hevur beinleiðis samband við sjógvin, kann koma nærri bryggjutrom enn 10 m".*

**Viðmerkingar**

Broytingarnar í byggisamtyktini snúgva seg um at geva heimild til, at fyllast kann út á sjógv í Nesi, frammanfyri kommunalu ognini matr. nr. 80a, Hvalba, soleiðis at ein landstøð kann verða bygd á tað uppfylta sjóøkið.

Broytingin í byggisamtyktini er tí bæði í kortpartinum til byggisamtyktina og í ásetingunum.

Kortið, sum vísir ætlaðu broytingina er dagfest 21. februar 2023.

**Viðmerkingar til § 5, stk. 1**

Broytingin í §5, stk. 1 er, at orðingin «Í økispartinum fyri Nes er eisini heimilað at byggja landstøð til alivirksemi» er skoytt uppí ásetanina fyri at gera greitt, at heimild er til at geva byggiloyvi til landstøð til alivirksemi í Nesi. Samanhildið við kortskjalið til byggisamtyktina er harvið talan um nærri avmarkað øki, har landstøð kann verða bygd og staðsett.

Viðvíkjandi uppfylta sjóøkinum er ætlanin, at hetta skal verða kommunal ogn, eins og matr. nr. 80a, Hvalba.

**Viðmerkingar til § 5, stk. 4**
Broytingin er, at eitt nýtt pkt. er skoytt uppí stykkið, sum heimilar byggivaldinum at geva byggiloyvi til, at landstøðir, egningarskúrar o.l. kann koma nærri bryggjutrom enn vanligu 10 metrarnar. Hetta er ikki bara galdandi fyri økið í Nesi, men í øllum umráðsiparti D. Meginreglan í havnarøki er tó framvegis, at bygging skal vera minsta lagi 10 m frá bryggjutrom.

**Tekniska nevnd 22.02.2023:**
Meirilutin í nevndini mælir til at gera broytingarnar í byggisamtyktini sambært viðhefta tilfari.
**Vega- og havnanevndin 23.02.2023:**
Meirilutin í nevndini mælir til at broyta byggisamtyktina og tilhoyrandi broytingartekst fyri Hvalbiar Kommunu soleiðis:
§5, stk.1 verður broyttur eisini til at innihalda «Í Nesi er eisini heimilað at byggja landstøð til alivirksemi».
§5, stk.4 «Tó kann byggivaldið geva loyvi til, at landstøðir, egningarskúrar o.a., sum hevur beinleiðis samband við sjógvin, kann koma nærri bryggjutrom enn 10 m».
**Avgerð:**
Samtykt við fimm atkvøðum fyri at fylgja tilmælunum hjá nevndunum og at umsókn um sundurbýti til samanlegging av matr. nr. 80a í Nesi verður send Umhvørvisstovuni.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 17.30

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson

Martin í Nesi Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen